# Almannamálaráðið

**Lógartænastan**

| | |
|---|---|
| Dagfesting: | 2. november 2020 |
| Mál nr.: | 20/00656 |
| Málsviðgjørt: | DB |
| Eftirkannað: | Lógartænastan dagfestir |

**Uppskot til**

**Kunngerð**
**um**
**móttøkuskyldu hjá Almannaverkinum**

Við heimild í § 49, stk. 3 í løgtingslóg nr.72  frá 25. mai 2020 um almannatrygd og tænastur verður ásett:

**§ 1.** Henda kunngerð ásetir nærri reglur um móttøkuskylduna hjá Almannaverkinum í mun til persón, ið er dømdur sambært § 74 a í revsilógini og persón,

1) sum sambært rættarúrskurði skal sinniskannast,
2) sum sambært rættarúrskurði ella dómi skal setast í vardan bústað ella vera undir eftirliti, undir hesum møguleika fyri fyrisitingarliga at verða settur vardan bústað ella
3) sum treyt fyri at ákæruafturtøku ella royndarleyslating verður settur í vardan bústað ella vera undir eftirliti, undir hesum við møguleika fyri fyrisitingarliga at verða settur í vardan bústað.

*Stk. 2.* Tekur rætturin avgerð um at persónur skal dømast sambært § 16 ella 74a í revsilógini, skal Almannaverkið uttan drál veita sosialnámsfrøðiliga viðgerð og bústaðartilboð.

*Stk. 3.* Endamálið við móttøkuskylduni er at tryggja, at persónur, sum er dømdur sambært § 16 ella §74 a í revsilógini, fær bústaðartilboð, har dentur verður lagdur á at fyribyrgja, at persónurin fremur kriminalitet.

*Stk. 4.* Við støði í treytunum í dóminum og fyritreytunum hjá persóninum skal veitast sosialnámsfrøðilig viðgerð, sum stuðlar persóninum í at fáa eitt virkið, sjálvstøðugt og innihaldsríkt lív uttan kriminalitet.

*Ætlan, samskipan og samstarv*

**§ 2.** Almannaverkið hevur skyldu til at gera eina ætlan, sum er í tráð við dómin og skal fevna um veiting, tænastu og viðgerð, sum persónur fær frá Almannaverkinum, um viðgerð og tilboð, sum persónur fær frá øðrum myndugleika, stovni ella sjálvbodnum felagsskapi, og um skiftið, tá dómurin er liðugt avsonaður.

*Stk.2.* Ætlanin skal fevna um:

1) longd á fyriskipan,
2) hvørji mál strembast skal eftir,
3) mett tíðarskeið fyri at røkka málunum,
4) eftirmeting og tillaging av ásettum
5) Uppgávubýti og ábyrgdarbýti millum persón og starvsfólk í mun til at røkka settum málum

**§ 3**. Persónur, sum er fevndur av hesi kunngerð, skal hava ein fastan málsviðgera, sum hevur samband við persónin og sum virkar sum samskipari í mun til veitingar og tænastur frá Almannaverkinum og í mun til viðgerð og tænastur, sum persónur fær frá øðrum myndugleika, ella sjálvbodnum felagsskapi.
*Stk. 2.* Ásetingin í stk. 1 er eisini galdandi, tá tilboð verður veitt í øðrum parti av ríkinum.
*Stk. 3.* Persónur, sum fær bústaðartilboð frá Almannaverkinum, skal eisini hava kontaktpersón, sum starvast á bústaðnum.

**§ 4.** Hevur persónur tørv á viðgerð ella tilboði, sum Almannaverkið ikki veitir, hevur Almannaverkið skylduat  samstarva við avvarðandi myndugleika, stovn ella sjálvbodna felagsskap, sum veitir tilboð ella viðgerð og at viðvirka til, at tilboðið og viðgerðin verður veitt.
*Stk. 2.* Um nøktandi tilboð ikki er til viðkomandi í Føroyum orsakað av vantandi fakligum førleika til at veita nøktandi tilboð, ella tí at grundarlag ikki er fyri at skipa tilboðið, skal Almannaverkið skipa fyri nøktandi tilboði í øðrum parti av ríkinum, gera avtalu um innihaldið í tilboðnum og kostnað við tann, sum veitir tilboðið.

**§ 5.** Henda kunngerð kemur í gildi 1. januar 2021.

Almannamálaráðið, 2. november 2020

**Elsebeth Mercedis Gunnleygsdóttir**
landsstýrismaður

/ Eyðun Mohr Hansen